Maskinmeistari | Maskinistur | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar

## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2011. Umsóknarfreistin er 1. desember 2010**



**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina verður í januar og í august í 2011.

**Maskinistur**
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinist verður í august í 2011. (Umsóknarfreist er 1. juni 2011).

**Skipari**
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

Upptøka til skipara verður í januar og í august í 2011.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipsførara verður í januar og í august í 2011.

Maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: **www.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

KREA · TEL 60 80 80

---

Starvslýsing

**Les alla lýsingina á heimasíðu okkara www.naerverk.fo / leys størv**

Meginskrivstovan

# Fíggjarstjóri til Nærverkið

Meginskrivstovan søkir eftir fíggjarstjóra til Nærverkið. Sum fíggjarstjóri hevur tú beinleiðis tilvísing til Mary J. í Garði, stjóra, og tú verður partur av leiðslutoyminum.

Fíggjarstjórin hevur ein stóran leiklut í almennu vælferðini. Nærverkið umsitur eina játtan upp á 550 mió. krónur, sum skulu stýrast við størsta hegni og nærlagni. 550 mió. krónur, sum fíggja eldrasambýli, rakstur av røktarheimum, heimarøkt, sambýli fyri menningartarnað, vardar verkstaðir, sambýli og tænastur til sálarsjúk, og stuðul og bú- og viðgerastovnar til børn og ung. Afturat hesum eru lønarútgjaldingar til øll 1600 starvsfólkini, ið starvast kring alt landið.

Títt arbeiðsøki verður avbjóðandi og víttfevnandi. Tú skalt kunna hava nógvar bóltar í luftini í senn. Og tú skalt duga at halda høvdið kalt, tá á stendur.

Uppgávurnar spenna frá fíggjarlógararbeiði, fíggjarstýring og framrokningum til ráðgeving og vegleiðing internt og eksternt og íverksetan av broytingum og nýggjum tiltøkum.

Tú fært dagligu ábyrgdina av fíggjar-, roknskapar- og lønarviðurskiftunum í Nærverkinum. Fíggjarstjórin skal taka sær av umsiting av rakstrargøgnum og felags innkeypi. Og tað verður tú, ið skal samráðast um rakstraravtalur, leigusáttmálar og keypssáttmálar og umsita hesi.

Játtanin til Nærverkið er av landsins størstu. Tað krevur hollan fíggjarligan kunnleika. Góð samstarvsevni eru neyðug, tí kabálin skal ganga upp.

Við uml. 1600 starvsfólkum er Nærverkið Føroya størsta arbeiðspláss. Nærverkið er ein landsstovnur, og fíggjarstjórin kemur at hava sítt dagliga arbeiðspláss á Meginskrivstovuni, ið húsast á Argjum.

**Vit vænta, at tú hevur:**

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. cand.polit., cand.merc. ella cand. oecon.
- Viðkomandi starvsroyndir innan fíggjarviðurskifti
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- KT-kunnleika
- Hollan málsligan førleika

**Setanarviðurskifti:**
Setanarøkið er Nærverkið umframt Almannamálaráðið við stovnum. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins, umframt 15% í eftirløn, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Tann, sum sett/-ur verður, má tola broytingar í starvsinnihaldinum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra á tel. 36 00 00.

**Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skulu sendast til:**
Nærverkið
Stílað: Mary J. í Garði, stjóri
Argjavegur 26, Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Ella til maryG@naerverk.fo

**Umsóknarfreist: Fríggjadagin 17. Desember 2010**

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Stuðuls- og Trivnaðartænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

www.naerverk.fo